# Fjarðastevnan 2005



*- Vit vóna, at nógv fólk leggja sær leiðina út á Skála – til kapppróður og onnur áhugaverd tiltøk, sum vit hava á skránni til Fjarðastevnuna, siga feløgini á Skála*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fyrsti FM-róður á Skála nakrantíð

**Umstøðurnar at rógva kapp á Skálafjørðinum eru sera góðar. Kortini vilja Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag tryggja sær, at hesin fyrsti FM-róðurin gongur so væl, sum yvirhøvur tilber**


Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


Á Fjarðastevnuni, sum verður á Skála komandi vikuskiftið, verður á fyrsta sinni nakrantíð skipað fyri FM-róðri.

Ikki tí; kapppróður er ikki nakað nýtt fyribrigdi á Skála. Í eini 30 ár hevur Skála Ítróttarfelag skipað fyri bygdastevnu, har eisini kapppróður hevur verið ein fastur táttur í skránni.

Bygdastevnan á Skála hevur vanliga ligið seinasta vikuskiftið fyri norðoyastevnu, og tí hevur hon fyri mong verið tann seinasta styrkiroyndin, áðrenn FM-stigini í kapppróðri fara at rulla.

### FM-róður

Leygardagin verður soleiðis fyrsti FM-róður á Skála.

Fyri skálafólk verður hetta sjálvandi ein stórur dagur, tí kapppróður er gomul ítrótt á Skála. Sambært hagtølum hjá Róðrarsambandi Føroya hava skálabátarnir vunnið níggju meistaraheitir síðan 1973.

- Men hetta sigur ikki alla róðrarsøguna hjá okkum, tí fyri 1973 høvdu vit vunnið hópin av róðrum í egnum og læntum bátum, siga Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag í tíðindaskrivi.

Lagt verður aftrat, at skálamenn fara at gera nógv burtur úr fyri at fáa róðurin at ganga, sum hann skal á Fjarðastevnu.

- Til varmakeldu-róðurin gav trolvirkið, Vónin í Fuglafirði, Róðrarsambandi Føroya ein nýggjan og sterkari fastan start – og hesin verður eisini brúktur á Skála.

Á Skála er nevniliga ætlanin at hava tveir fastar startir, ein innari og ein ytri.

- Innara síðan av róðrarøkinum verður uppmerkt við boyum fyri hvørjar 200 metrar, og eisini verða ljós sett upp innanfyri málið at stýra eftir hjá róðursmonnunum.

Feløgini siga, at fyri at fáa FM-róðurin at ganga so skjótt sum tilber, byrja barnaróðrarnir klokkan 13.30.

### Góðar umstøður

Umstøðurnar at rógva á Skálafjørðinum eru sera góðar, og í so máta er Skála einki undantak.

- Kortini vilja vit tryggja okkum, at hesin fyrsti FM-róðurin gongur so væl, sum yvirhøvur tilber.

Feløgini vísa á, at málið verður á Stórhúskaiini, har útsýnið yvir róðrarøkið er serstakliga gott.

- Hetta er umleið 200 metrar innanfyri byggihøllina á skipasmiðjuni, har bátarnir annars verða flotaðir. Her fara vit eisini at hugna um, soleiðis at áskoðarar og róðrarfólk fáa ein góðan dag. Eitt nú verða borð og stólar sett upp á mál-økinum, skipað verður fyri matsølu, og eisini verður tivoli og hoppiborgir á havnalagnum.

Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag, sum standa fyri hesum fyrsta FM-róðrinum á Skála, vóna, at undirtøkan fyri kapppróðrinum og stevnuni annars verður góð.

- Vit vóna, at nógv fólk leggja sær leiðina út á Skála – til kapppróðurin og onnur áhugaverd tiltøk, sum vit hava á skránni til Fjarðastevnuna, siga feløgini.